# Royndarvenur við FC Midtjylland

Í hesum døgum royndarvenur 15 ára gamli Teitur M. Gestsson úr Klaksvík við danska felagnum FC Midtjylland. Sunnukvøldið fór ungi málverjin til Herning, har hann skal royndarvenja við FC Midtjylland, ið er tiltikið fyri sítt stóra ungdómsarbeiði. Fram til hósdagin skal hann venja við dreingjaliðnum og unglingaliðnum hjá felagnum. Teitur M. Gestsson, sum spælir við KÍ, hevur áður royndarvant við Brøndby IF. Hann hevur eisini royndir frá føroysku U15 og U17 landsliðunum.



# Hondbóltsfinalurnar fluttar

HSF hevur gjørt av, at FM-finalurnar skulu spælast fyrr, enn upprunaliga ásetingin segði. Ein orsøk til flytingina er, at kvinnulandsliðið møguliga skal til Cypros at spæla í Challenge Trophy-kappingini. Tann kappingin verður í døgunum 25. 30. mars, og skuldu finalurnar upprungaliga spælast um sama mundið. Nú er greitt, at fyrsta kvinnufinalan verður spæld 18. mars. Næsta finalan verður tann 20. mars og ein møgulig triðja finala skal spælast 22. mars. Hjá monnunum verður fyrsta finalan spæld 20. mars. Næsti dysturin er á skránni 22. mars og ein møgulig triðja finala verður spæld annan páskadag. T.e. 25. mars.

# Supertalent úr Sandavági ger um seg í NM




*Høgni, sum í fjør varð valdur til "Ársins stjørnuskot", skrivar søgu í føroyskari telving*

**Tað er ikki á hvørjum degi, at 10 ára gamlir føroyingar blanda seg upp í elituna uttan fyri Føroyar, men Høgni E. Nielsen skrivaði talvsøgu, tá hann sum fyrsti føroyingur megnaði at vinna silvurmerki í yngsta bólkinum í NM fyri ung**

TALV
*Ólavur Simonsen*
*olavur@sosialurin.fo*

NM í talvi fyri ung varð leikt um vikuskiftið í Danmark. Tíggju føroyingar luttóku í ymiskum aldursbólkum. Hesir tíggju telvararnir hava kvalifiserað seg til NM við at vinna undankappingar, ið leiktar vóru í Føroyum. Ein telvari, ið skaraði framúr, var Høgni Egilstoft Nielsen úr Sandavági, sum fekk 5 stig av 6 møguligum. Hetta er ikki áður hent í yngsta aldursbólkinum. Enn meira sjálvsamt er, at 5 stig ikki røkka einum fyrsta plássi, men hesaferð fór sviin, Egor Norlin, avstað við fyrsta plássinum við 5½ stigum.

### Talentblóð úr Sandavági

Høgni er sonur navnframa fótbóltsleikaran, Torkil Nielsen, ið fyri nærum 18 árum síðani setti Føroyar á heimskortið við at skorða móti Eysturríkið í Landskrona. Síðan Torkil legði gaggurnar á hillina, hevur hann verið virkin á ovastu rók í føroyskari telving. Báðir synir hansara, Rógvi og Høgni, eru millum fremstu unglingar í Føroyum, og luttóku teir báðir í NM um vikuskiftið. Rógvi fekk 2½ stig, har hann bert tapti eitt talv í næst ovasta bólkinum, sum eisini er eitt frálíkt úrslit.

### Høgni næstan fult stigatal

Høgni telvar sera álopsinnað og málrættað. Hann telvaði eisini sera sannførandi í NM, har hann bert tapti móti Egor, ið vann bólkin og harvið gjørdist Norðurlandameistari. Talvið millum Høgna og Egor var ótrúliga torgreitt, har Høgni hevði fleiri møguleikar at basa svianum. Í slíkum støðum er tað sera trupult at finna røttu leikirnar, men hevði Høgni hildið høvdið kalt til røttu tíðina, hevði hann óivað fingið fult stigatal og eisini heitið sum Norðurlandameistari.

### Helgi silvur eins og Høgni

Helgi D. Ziska hevur skarað framúr í føroyskari telving, og enn einaferð megnaði hann at fáa eitt framúr úrslit. Við 4½ stigum endaði Helgi á einum deildum fyrsta plássi í besta bólkinum saman við Gudmundi Kjartansyni. Gudmundur hevði tó betri mótstøðustig, og tí mátti Helgi taka til takkar við einum silvurmerki.

# Høgni vs. Egor

Av tí at talvið millum Høgna E. Nielsen og Egor Norlin varð so væl telvað, er talvið endurgivið her við viðmerkingum.

Hvítur: Høgni E. Nielsen
Svartur: Egor Norlin
Kapping: NM fyri ung

1. e4 c5
2. Nf3 d6
3. c3 Nf6
4. Be2 g6
5. d3 Bg7
6. Be3 Nc6
7. O-O a6
8. h3 Qc7 — Hetta er ein lítið telvaður variantur í Sikiloysku byrjanini
9. Qc1 h5
10. Nh2 e6
11. f4 ... — Báðir vísa øgiligan álopsanda
11. ... Bd7
12. Nd2 Rc8
13. e5 dxe5
14. fxe5 Nd5
15. Bxc5 Nxe5
16. d4 Bh6
17. c4 Ne3
18. Ne4 ...



Fantastiskt at síggja tveir so ungar telvarar loypa út í eina so torgreidda støðu.
18. ... N3g4
19. Qe1 ... — Her hevði Høgni møguleikan at fáa Egor niður við nakkanum við 19. Qc3 Nxh2 20. Nd6+ Kd8 21. Kxh2 Nc6 og hvítur vinnur ein mann 22. d5
19... Be3+
20. Kh1 Nd3
21. Nd6+ ... — Her glapp annar møguleikin Høgna úr hendi, betur var 21. Nxg4 Nxe1 22. Nxe3 Nxg2 23. Nxg2 við einari knúsandi støðu hjá hvítum
21... Qxd6 — Her tekur Egor yvirtakið
22. Bxd6 Nxe1
23. Bxg4 hxg4
24. Be5 Rh4 — Betur var 24... Nc2 Nú vendur støðan aftur til fyrimun til Høgna
25. Raxe1 Bg5
26. Nxg4 Rxc4
27. Rf2 ... — Sterkari var 27. Bf6
27... Bc6
28. b3 Rb4
29. Rd1 ... — Høgni vildi við 29. Kh2 framvegis ligið omaná, men ger ein feil, sum fær alt at skrambla saman
29... Rxh3+
30. Kg1 Rh4
31. Bd6 Rxg4
32. Bxb4 Be3
33. Kf1 Bxf2
34. Kxf2 Rxg2+
35. Ke3 Rxa2
36. Rh1 Bxh1
0-1